# Fantastiskt í Grø

**Ein spontan avgerð um at fara til Grønlands at ansa børnum, hevur givið mær eitt tað besta upplivilsi, sum eg havi havt, sigur Joan Waag Høgnesen úr Vestmanna**

Hálvan januar las Joan Waag Høgnesen í Sosialinum um eina familju í Grønlandi, sum leitaði eftir einari føroyskari gentu at koma at ansa dóttir teirra. Unga vestmannagentan, sum í 2007 var í Ukraina har hon hálpti gøtubørnum, smekkaði til beinavegin – hetta var ein møguleiki hon ikki mátti lata fara aftur við borðinum!

Hon ringdi og avtalaði ein fund við parið, sum júst tá var heima í jólaferiu. Fundurin teirra millum vardi ikki leing, tí 'kemiin' var beinanvegin í lagi. Føroyska parið var Sæunn og Bjartur Nolsøe. Bjartur er kredittleiðari í Grønlandsbankanum og Sæunn starvast hjá Grønlands Tele. Joan sigur, at fundurin gekk meir út uppá at tosa um, hvørja framtíðarætlan føroyska parið í Grønlandi hevði við eini barnagentu.

## Svav 18 tímar

14 dagar seinni var Joan farin úr arbeiðnum hjá sær á Vestmanna Fiskavirkið og stóð nú í kavaklædda Nuuk, púra 'forvirrað', sum hon tekur til.

- Eg hugsaði um, hvat eg hevði rótað meg útí! Her – í hesum fyri mær fullkomuliga ókenda býnum – skuldi eg nú brúka næsta hálva árið saman við eini familju, sum hon bert hevði heilsað uppá einaferð!

Hetta var kortini óneyðugur ótti, tí hetta skuldi vísa seg at verða eitt ta størsta upplivilsi hon hevur havt higartil! Á flogvøllinum kom Sæunn L. Nolsøe og yngsta dótturin, Petra, eftir henni. Joan skuldi búgva hjá nýggju hesi familjuni: Sæunn og Bjartur Nolsøe, og teirra trimum børnum: Bjørk, 7 ár, Beinir, 5 ár og Petra, 1 ár. Tey búgva í Eqalugalinnguit í Nuussuaq.

Tað var við spenningi Joan møtti síni nýggju familju ein fríggjadag í Nuuk. Eftir ein drúgvan túr sum – umvegis Keypmannahavn og Kangerslusuaq – tók 3 dagar, var Joan endiliga í Nuuk nýggja heimlandi sínum komandi hálva árið Grønland.

Hvørt langa reisan var orsøkin, møði, nervar, bangilsi ella hvat, veit Joan ikki, men fyrsti blundurin í Grønlandi vardi 18 tímar!!

- Eitt sindur flovsligt, sigur Joan við einum smíli, men eg slapp so undan trupulleikunum við 'jetlag', sigur hon.

Longu mánadagin eftir var hennara fyrsti arbeiðsdagur í húsinum. Uppgávan hevur fyrst og fremst verið at ansa eftir yngsta barninum Petru, og hereftir annað fyrifallandi arbeiði runt í húsinum, sigur Joan.





## Arbeiddi á sambýli

Tað gekk eitt sindur striltið í fyrstani, men so við og við kom Joan at kenna familjuna ordiligt og tey hana, síðan tá hevur hevur gingið sera væl. Teimum eldru børnunum dáma væl at hava gentu í húsinum, sum tímur at roksa og fjasa eitt sindur innímillum. Joan, sum dámar væl at passa børn, heldur, at hetta er eitt ordans upplivilsi.

Petra dugdi ikki so væl at práta, tá ið eg kom yvir, men nú dugir hon væl – er vaksin nógv síðani í januar! Joan sigur, at tey búgva eitt sindur burtur frá býnum, men tað er so deiligt at fara ein langan spákitúr oman í býin við barnavogni, bæði í